# Karl lagt árarnar inn



## Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag í 25 ár, doyði brádliga seinastu nátt, 67 ára gamal

Tað vóru ófrættatíðindi ið bórust í lýsingini í gjáramorgunin. Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag var brádliga deyður um náttina, 67 ára gamal.

Tað var ikki Karl Johansen í holdið borið, at hann skuldi gerast fakfelagsformaður í Havn í ein mansaldur.

Tað var mestsum av tilvild, at hann kom uppí nevndina í Havnar Arbeiðsmannafelag í 1975. Hann var farin á aðalfund og so endaði hann í nevndini. Og longu árið eftir varð hann formaður.

Men tað var júst sum fakfelagsformaður, at alt landið kom at kenna hann tey næstu 25 árini.

Nú, hann legði árarnar inn, hevur hevur hann júst hátíðarhildið sín 25 ára starvsdag, sum formaður Havnar Arbeiðsmannafelags, har ein mongd av fólki nýtti høvi at heiðra honum og har bæði arbeiðsgevarar, vinnulívsmenn og politikarar og onnur, vóru komnir saman at ynskja tillukku.

Á yngri árum var Karl annars til skips, eitt nú við Magnus Heinason.

Men dreymurin um at skiparaútbúgving, fekk ein bráan enda, tí hann var litblindur og tí sostatt slapp hann ikki sleppa á navigatørskúla og tí fór hann í land longu 27 ára gamal.

Karl er ikki kendur sum tann fakfelagsformaðurin sum var oftani í verkfalli. Hann hevði ta áskoðan, at tað, tú ikki ført í samráðingum við arbeiðsgevarum, fært tú heldur ikki í einum verkfalli.

Tó hava framstigini í hansara formanstíð verið rættiliga stór, men sum oftast eru tey hend í øllum stillum.

Størsta takið hjá Karl Johansen í Havnar Arbeiðsmannafelag, var uttan iva, tá eftirlønargrunnurin varð settur á stovn fyrst í áttatiárunum. Tað var at bróta upp úr nýggjum, tí tá var heilt óvanligt við pensjónsgrunnum.

Hesin grunnurin hevur havt ómetaliga stóran týdning fyri limirnar í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Sjálvur fylti karl Johansen 67 ár 3, januar og honum untist bert at fáa eitt útgjald úr grunninum……

Nú Karl hevði rokkið pensjónsaldurin, var hann farin at hugsa um at leggja frá sær. Hann stóð fyri vali í Havnar Arbeiðsmannafelag næsta ár og tá ætlaði hann sær at fara frá.

Hann duldi ikki fyri, at hann var farin at troyttast, knøini vóru farin at svíkja og, sum hann segði: Ongin er sterkari enn tað veikasta liðið, og tað mátti vit so øll sanna seinastu nátt.

# At tala til eygu og oyru

**Mánakvøldið, týskvøldið og mikukvøldið fer danin, Torben Østermark, at hava skeið fyri sunnudagsskúlalærarum, leiðarum í junior- og ungdómsarbeiði og annars øllum áhugaðum**

**Tíðindaskriv**

Børn og ung í dag eru ógvuliga von við at fáa upplýsingar bæði gjøgnum eygu og oyru. Kanningar vísa, at tað, sum tú bæði hevur hoyrt og sæð, festir seg betri í minninum enn tað, tú bara hevur fingið við gjøgnum oyruni. Hetta er ein stór avbjóðing fyri øll, sum arbeiða við børnum og ungum.

Fyri at hjálpa sunnudagsskúlalærarum og ungdómsleiðarum at gera tað sjónligt, sum sagt verður, skipar Heimamissiónin fyri skeiði, nevnt »Boðan til eygu og oyru«. Undirvísari er danin Torben Østermark.

Torben er landsleiðari hjá »Friluftsmissionen« í Danmark. Teir arbeiða júst við hesum at gera boðskapin sjónligan.

### Trý skeið

Skeið verða hildin á trimum støðum. Í missiónshúsinum á Glyvrum mánadagin 18. februar, í Meinigheitshúsinum í Havn týsdagin 19. februar og í KFUM & -K í Klaksvík mikudagin 20. februar. Allar dagarnar verður byrjað kl. 19.

Á skeiðnum fer Torben at vísa ymsar hættir, sum kunnu gera boðanina meira livandi. Millum annað fer hann at vísa, hvussu »talemale-bræt« kann verða nýtt, nakað um »Gospel magic« og at læra luttakararnar at gera ballónfigurar. Skeiðið er lagt til rættis soleiðis, at tú fært høvi at royna teg, og sostatt fært tú eisini ymiskt tilfar heim við, sum tú kanst nýta í arbeiðnum millum børn og ung. Á skeiðnum verður eisini høvi at keypa tilfar og bøkur um evnið.

Hóast skeiðið er miðað til sunnudagsskúlalærarar og leiðarari junior- og ungdómsarbeiðnum, eru øll áhugað vælkomin at luttaka.


"Tað hevði verið nógv lættari hjá fólki at tikið avgerð, um tey vistu, hvørja avgerð tey skuldu tikið"

Aldous Huxley



## Starvsfólk til Avrokningardeildina

Til okkara avrokningardeild verður søkt eftir fólki at byrja 1. mars 2002 ella skjótast gjørligt. Á avrokningardeildini starvast 9 fólk. Høvuðsuppgávurnar á avrokningardeildini eru debitorbókhald, debitorrøkt og innheintingarmál.

Uppgávan hjá tí, sum sett/ur verður, er serliga at vera við í menningini av debitorrøktini hjá Føroya Tele og annars at vera við í øðrum uppgávum á avrokningardeildini. Talan er um krevjandi og avbjóðandi starv.

**Tín førleiki**
Tann, ið sett/ur verður, skal hava skrivstovu-, peningastovns- ella hægri búskaparfrøðiliga útbúgving. Dentur verður lagdur á, at viðkomandi hevur royndir frá arbeiði við debitorum og leggur stóran dent á, at geva viðskiftafólki okkara eina góða tænastu. Somuleiðis skal viðkomandi kunna taka ábyrgd, arbeiða sjálvstøðugt og vera opin.

**Tað er eisini ein fyrimunur at hava**
- EDV førleika (á brúkarastøði)
- merkonom, HH, HA ella aðra viðkomandi útbúgving
- góðan røkjuskap
- góð samstarvsevni

Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum góðum, avbjóðandi og mennandi umhvørvi.

Lønin verður sambært avtalu millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið ella annað viðkomandi yrkisfelag.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at ringja til Jákup Danielsen, deildarleiðara, lokal 3370 ella Heina Joensen, fíggjarstjóra, lokal 3297.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. februar 2002.

Umsóknir skulu sendast til

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele er partafelag, ið Føroya Landsstýrið eigur [illegible]%. Á Føroya Tele arbeiða [illegible] fólk í [illegible] deildum á [illegible] ymiskum støðum kring alt landið. Fjarskiftisøkið er í stórari menning og tí er neyðugt at starvsfólk á Føroya Tele skulu kunna tola broytingar í starvsviðurskiftunum.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!




# Barbara er aftur í Føroyum



*Eitt kent andlit vitjar aftur í Føroyum. Anneke von der Lippe er glað fyri at vera aftur í Føroyum, hiðani hon hevur góð fleiri góð minnir*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Norski sjónleikarin Anneke von der Lippe er aftur í Føroyum. Hetta er fyrstu ferð, at hon er vitjar, síðan frumsýningina av filminum Barbaru fyri hálvum fimta ári síðani. Hon hevur verið ógvuliga virkin innan sjónleikin og hevur átt tvey børn hesi árini**

VITJAN
*Stefan í Skorini*

Stýrið í Norðurlandahúsinum hevði hósdagin og fríggjadagin fund, har tey løgdu skránna í hesum árinum til rættis.

Í stýrinum situr ein gamal kenningur hjá øllum føroyingum. Anneke von der Lippe hevur havt sæti í hesum stýri í eitt gott ár, men hon hevur tó ongantíð verið í Føroyum síðan frumsýningina av Barbaru.

Orsøkin er, at hon fyri stuttum átti eina gentu. Tí hevur ein tiltakslimur hjá Anneke røkt starvið í stýrinum fyri hana. Nú er hon tó farin aftur til arbeiðis eftir burðarfarloyvi.

– Eg siti í stýrinum sum umboð fyri Noreg, og ætlanin var, at eg skuldi koma til Føroyar, men vegna barnsburð lá tað ikki so væl fyri, sigur hon.

### Glað at vera aftur

Anneke von der Lippe sigur, at hon er ógvuliga glað fyri at vera aftur í Føroyum.

– Eg havi góð minnir hiðani, og tað er gott at vera aftur í Føroyum hóast árstíðin kanska ikki er tann besta, sigur hon.

Tó verður hon eisini mint aftur á tær minnu góðu løturnar í Føroyum, tá hon hugsar um veðrið henda dagin, tá Sosialurin fangaði hana uppi í Norðurlandahúsinum.

Hetta var, tá hon sat veðurføst í Føroyum í fleiri dagar, tí leikstjórin ikki tordi at senda sjónleikararnar heim. Vandi var nevniliga fyri, at teir ikki sluppu aftur til Føroya vegna veður.

Hon viðgongur, at henda gamla ræðslan frá tíðini í Føroyum um at sita veðurføst eisini hevur fest seg í minnið.

### Átt tvey børn

Síðan frumsýningina hevur Anneke von der Lippe átt tvær gentur. Tá frumsýningin var í Norðurlandahúsinum, var hon við barn, og síðani hevur hon átt eitt barn afturat.

Hóast hon hevur átt tvey børn, hevur yrkisleiðin ikki ligið still. Hon hevur spælt eitt ótal av filmum og sjónleikum.

Hon hevur fast starv sum sjónleikari í tjóðarsjónleikahúsinum í Oslo. Hon hevur m.a. havt høvuðsleiklutin sum Nora í leikinum “Et dukkehjem”. Hesin leikurin varð vístur í Washington og Edinburgh.

Harumframt hevur hon havt leiklutir í fleiri filmum og stuttfilmum. Yrkisleiðin hevur sostatt ikki ligið í dvala, hóast hon hevur sett tvey børn í verðina.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum,
sum sýndu samkenslu og hjálp,
tá kæri maður mín og bróður okkara

**Jóhan Vang Niclasen**
Hestur

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til Bergur Debes Joensen fyri góð
og troystarrík orð og til tykkum,
sum hjálptu so væl til við jarðarferðina.
Ein serlig tøkk til tykkum tríggjar,
sum sungu so vakurt í kirkjuni.
Tøkk til sjúkrahúsið.
Tøkk fyri blómur, kransar, minningarorð,
peningagávur til svimjihøllina á Hesti
og øllum tykkum, sum fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna
**Hermanda, Mona og Svanhild**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Karl Johansen,**
Tórshavn

andaðist fríggjamorgunin, 67 ára gamal.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Thea og børnini**


